# Skipalistin er vorðin fólkaogn




**Herfyri kom sjeyndi *Skipalistin* í røðini, og eins og undanfarin ár er hann á tremur við hentum upplýsingum um høvuðsvinnuna umframt stórum og góðum litmyndum av føroysku skipunum**

SKIPALISTIN 2006
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ikki kan sigast annað, enn at *Skipalistin* er vorðin ein góður felagi hjá mongum og mest sum er vorðin fólkaogn hjá bæði útróðrarmonnum, skipum og reiðaríum eins og almennum stovnum og privatum fyritøkum. Eisini uttanlands er áhugi fyri bókini, har fólk og stovnar, ið hava vinnuligt tilknýti til Føroyar, nýta *Skipalistan* í teirra arbeiði.

### Dagførdur og álitandi

Tað sæst rættiliga týðiliga, at nógv arbeiði liggur aftanfyri, áðrenn árligi Skipalistin endaliga er greiddur úr hondum. Ernst Olsen, sum saman við Magna Olsen ritstjórnar útgávuni, sigur, at stórur dentur verður lagdur á, at allar tær túsundtals upplýsingarnar í *Skipalistanum* eru rættar, og nógvar dagføringar tí verða gjørdar til hvørja útgávu. Til tess at tryggja at upplýsingarnar eru so rættar sum til ber, samstarvar *Skipalistin* við avvarandi stovnar og myndugleikar, umframt at skipa- og báteaigarar hvørt ár senda rættingar inn.

### Væl umtókt myndatilfar

Tætta samstarvið við myndamenn ymsa staðni í Føroyum hevur við sær, at nýggjar, góðar litmyndir av føroysku skipunum altíð eru í bókini. Hetta við góðum og nýggjum myndum saman við dagførdum upplýsingum um skipini, er vorðið eitt eyðkenni hjá *Skipalistanum* og hevur gjørt hann sera væl umtóktan millum bæði tey ungu og eldru, sigur Ernst. Til dømis er tað heilt vanligt, at síggja *Skipalistan* liggja frammi á Ellis- og røktarheimum, har uppilagstir sjómenn framvegis vilja fylgja við tí nýggjasta, sum hendir innan fiskiflotan. Í *Skipalistanum 2006* eru dagførdar upplýsingar og myndir av føroyskum skipum úr 12 bruttotonsum og uppeftir eins og upplýsingar um bátar millum 4 og 12 bruttotons. Eisini eru umfatandi leitiyvirlit, so til ber at finna okkurt ávíst skip útfrá ymiskum leitorðum, eitt nú eftir eigara, stødd, maskinorku o.ø..

### Lógarkravdur føroyskur álmanakki

Ein av aðaltáttunum í *Skipalistanum* er føroyski álmanakkin, sum sambært løgtingslóg um bjargingarútgerð er krav umborð á bátum undir 20 bruttotons. Tað merkir, at bókin lýkur lógarkrøvini um føroyskan álmannakka. Hjá útróðrarmonnum eru neyvar upplýsingar um streymviðurskiftini alneyðug. Í *Skipalistanum* er alt tilfarið savnað á einum stað, og í bókini eru bæði streymtalvur, streymkort og tíðir fyri vestfalls- og eystfallskyrrindi umframt broddarnar.

**Fríðka uppseting**

Yvirhøvur er fríðkað um uppsetingina av innihaldinum í *Skipalistanum* í ár, og sum heild er innihaldið væl skipað og uppsett. Frámerki eru uttast á síðunum, sum gera tað lættari at finna ávísar partar av bókini, og sum nakað nýtt er eitt bókamerki við ymsum enskum heitum lagt inn í bókina.

Umframt upplýsingar um skip og bátar er eisini hópin av øðrum upplýsingum í bókini. Eitt nú kann nevnast radio- og samskiftisviðurskifti, neyðarkall, bráfangishjálp, signalfløgg, vitar í Føroyum, djóralívið á ymiskum tungumálum, havstreymar, ættirnar, almennar upplýsingar um veður, mát og vekt, føroyski róðrarbáturin, grindahvalurin og mangt annað. Eisini eru hagtøl, ið á ymsan hátt lýsa føroysku fiskivinnuna. Seinast í bókini eru upplýsingar um havnir í Føroyum, alivinnuna og oljuvinnuna umframt lógarsavn við viðkomandi lógum. Umfatandi innihaldið er avmarkað til tað, sum hevur at gera við skip og sjógv. Hetta metir Ernst Olsen avgjørt vera eina styrki við útgávuni, tí heldur enn at gera eitt sindur burtur úr nógvum, verður í *Skipalistanum* gjørt nógv burtur úr tí, sum er veruliga viðkomandi hjá brúkarunum.



*Tað er ein avgjørd styrki við Skipalistanum at innihaldið avmarkar seg til tað, sum hevur við skip og sjógv at gera, heldur Ernst Olsen, ritstjóri*

# Nevndin viðvíkjandi øktum kvinnuleikluti í politikki er vald

**Fýra mans og seks kvinnur skulu fram til ársskiftið 2007/08 virka fyri, at tað verður eitt javnari býti millum kynini, har politiskar avgerðir verða tiknar. Lisbeth L. Petersen er forkvinna í nevndini**

JAVNSTØÐA
*Eirikur Lindenskov*

Landsstýrismaðurin í javnstøðumálum, Hans Pauli Strøm, hevur valt nevndina, sum hevur til endamáls at slóða fyri einum javnari kynsbýti har, politiskar avgerðir verða tiknar.

Arbeiðið hjá nevndini fer at fevna um tiltøk, sum skulu gera fólk varug við týdningin av einum javnari kynsbýti, har politiskar avgerðir verða tiknar. Tiltøkini kunnu vera upplýsing, lýsingarátøk, undirvísing og útgávur av ymsum kunnandi tilfari.

Hans Pauli Strøm vónar, at arbeiðið hjá nevndini fer at hava við sær, at talið av kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrum økist, og at umboðanin fer at samsvara við umboðanina í hinum Norðurlondunum.

Um ársskiftið 2007/2008 skal nevndin handa landsstýrismanninum eina frágreiðing um virksemið og tilmæli um, hvussu framhaldandi eigur at verða arbeitt fyri at fremja javnstøðu, har politiskar avgerðir verða tiknar.

Lisbeth L. Petersen er vald sum forkvinna í nevndini.

Tey, ið mannað nevndina eru:
Lisbeth L. Petersen, forkvinna,
John Johannessen
Inga Dahl
Annleyg Lamhauge
Sólfríð Fjallsbak
Hjørdis Háberg Petersen
Kári á Røgvi
Bergtóra Hanusardóttir
Eyðun Christiansen
Steinbjørn Jacobsen

# Pipar & Salt skriva á DVD'ir

Í dag frá kl. 18.00 til 19.00 skriva Pipar & Salt á sína nýggju DVD í fløguhandlinum hjá HCW Tórgarð í Gongugøtuni í Havn. Og í morgin, mikudagin, verður skrivað í Leikalund í Klaksvík. Tað verður frá kl. 19.00 til kl. 20.00.

Umframt at fáa skrivað á DVD'ina, ber til at skifta nøkur orð við Pipar & Salt um lívið

**nud**



# Cornflakes ikki glutenfrítt

Við hesum verður sagt frá, at fráboðan er komin frá Dansk Cøliakiforening um, at Kellog's Cornflakes, Kellog's Frosties og Kellog's Frosties við 1/3 minni sukur ikki longur kann roknast upp í tey glutenfríu.

Men tað finst eitt slag av cornflakes frá Urtekram, sum er gjørt bara úr majs og majsmalti. Møguliga finnast onnur sløg av cornflakes, sum er gjørt við majsmalt.

So um ætlanin er at gera cornflakeskøkur á jólum, so verður mælt til at nýta eitt nú Urtekram cornflakes ella Rice Crispies ella Coco Pops, hesu bæði seinnu innihalda langt undir markinum av hvat kann vera í av maltekstrakt, sigur Mariann Patursson, kostráðgevi á Landssjúkrahúsinum.

Sjá nærri á www.coeliaki.dk